











# Númótans raðhús í barnavinarligum grannalagi

**Niðarliga í Hoyvíkini – í Maritugøtu, sum er annar vegurin til høgru á Løgmannabreyt – er nú møguleiki fyri at ogna sær eini nýmótans, væl innrættað og vælhildin raðhús.**

## Stødd

Húsini eru frá 2005 og eru í tveimum hæddum. Hvør hæddin er 57 fermetrar. Fermetrarnir íalt eru 114. Harumframt kemur eitt úthús/hjallur á góðar 4 fermetrar.

## Snildislig innrætting

Innrættingin av húsunum er væl umhugsað, og kelað er fyri hvørjum fermetri. Hetta ásanna tit skjótt, eftir at hava sett bilin í asfalteraðu innkoyringina, og hava verið ein rundtúr í húsinum.

## Gesta-wc og vaskirúm

Tá ið tit í neðra koma innar í flísaløgdu gongina við hita í gólvinum, hava tit á vinstru hond eitt gesta-wc, sum eisini virkar sum vaskirúm. Flísar og hiti eru eisini í her.

## Stova og køkur í einum

Komin innar í stovuna og køkin, sum eru í einum, varnast tit serligu gólvrúmdina til børnini í stovuni. Spísiborðið stendur tí í køkinum - sum er nakað heilt fyri seg. Einkul og funksjonellur, við einum amerikanarakøliskápi við ísmaskinu og frystiboks.

## Flisaløgd terassa við sólargangi

Frá stovuni fara tit út á flisaløgdu terassuna, sum er 20 fermetrar. Sólargangurin á terassuni er av tí fagrasta. Møguleiki er eisini at gera nýtslu av einum niðara parti av terassuni, sum er umleið 10 fermetrar.

## Miðhæddin – nakað fyri seg

Úr gongini gongur trappa úr eik upp á miðhæddina, har ið gongd, stórt baðirúm við baðikari, brúsu og hita í gólvinum, og trý stór kømur, eru. Tað største kamarið er innrættað til sjónarps-, arbeiðs- og gestarúm.

## Gólv, skjótihurðar, tapet v.m.

Øll gólvini eru hvíttoljerað eik. Allir veggirnir í húsunum eru klæddir við sløttum filti, og eingir vindeyga- og durakarmar ella gáttur eru í húsinum. Tríggjar plássparandi skjótihurðar eru millum wc-ini og gengurnar og millum gong og køk. Antennustik eru í øllum rúmunum

## Sparkivøllur, spælipláss og eigarafelag

Nógv børn, yngri sum eldri, eru í góða grannalagnum. Vælvirkandi eigarafelag skipar fyri felags antennuskipan og tiltøkum. FIFA sparkivøllur verður liðgur fyri summarfrítíðina, og stórt spælipláss er í umbúna. Stutt er til barnagarð, vøggustovu og skúla. Atgongd er til býlingshúsið

## Ovasta loft

Raðhúsini hava eitt rúmligt ovasta loft við gólvi, sum er klárt at brúka til goymslurúm.

*Verið vælkomin at hyggja at húsunum. Leygardagin 17.3. kl. 12.00-13.00*

skyn